Einasta blaðið
5 ferðir
um vikuna

tíðindablaðið
# sosialurin
Telefon 11820 Telefax 14720

Tíðindi, lýsingar, sjónarmið, orðaskifti, myndir – bert ein partur av tí, tú finnur í blaðnum...

## veðrið

Hatrystið sunnan fyri Ísland verður enn eitt bil saman við tilhoyrandi hatrystiryggnum frá Føroyum til Norskahavið mest sum standandi í stað. Lagtrystið á kappaleiðini rekur í landnyrðing til Íslands og tilhoyrandi brugvaleg við avfalli rokka Føroyum friggjanattina. Annað lagtryst fer í vikuskiftinum vestaneftir yvir Føroyum.

### Hosdagin



Bert upp í andøvsgul undir 8 m/s, av ymsum ættum, lutvíst adrigið, mest sum turt, einamest gott sýni og sólarglottar, tó kanska mjørki í støðum. Hitin um dagin millum 8 og 12 stig. Friggjanattina millum útsynning og sunnan, meira adrigið, okkurt ælið, annars toluligt ella gott sýni. Hitin niður í 6 stig.

### Friggjadagin

Gul upp í stívt andøvsgul, 5–10 m/s, av suðri, adrigið, regn í skiftum ella ælingur, annars toluligt sýni. Hitin millum 6 og 10 stig.

### Leygardagin

Frískandi til millum andøvsgul og strúk í vindi, 8–13 m/s, av suðri og landsynningi, adrigið, regn og bert toluligt sýni. Hitin millum 7 og 10 stig.

### Sunnudagin & mánadagin

At byrja við gul upp í stívt andøvsgul, 5–10 m/s, av landsynningi og eystri, mánadagin frískandi og hækkandi til millum andøvsgul og strúk í vindi, 8–13 m/s, av norði, eitt sindur skiftandi skýferð og sýni, annars regn ella ælingur í skiftum. Hitin millum 5 og 10 stig.

## óli teknar

© 1991 Sosialurin/Óli Petersen

### Køsturin




Shell ætlar at søkkja ein gamlan oljupall við Føroyar










*EIA herferðin heldur fram:*

# Kendir filmsleikarar móti grindadrápi



Hugflogið hjá EIA at vinna føroyingum neisir og steðga grindadrápi tykist onga avmaking av hava. Nú fer felagsskapurin undir eina nýggja herferð móti grindadrápi og fyri at breiða boðskapin út millum fólk hava fýra kendir bretar, filmaleikararnir Emma Thomson og Bob Hoskins og tónleikahjúnini Poul og Linda McCartney játta at vera við í herferðini.

EIA roynir í hesum døgum eisini at fáa bretskar politikarar á bæði høgra og vinstravonginum til at standa saman í stríðnum móti føroyska grindadrápinum.

Tað er enn óvíst, nær herferðin byrjar, men hon kemur so um sama mundið, sum altjóða hvalaveiðufelagsskapurin á fundi í Dublin hevur heitt á føroyingar um at betra um drápsháttin.

EIA heldur hetta tó ikki vera nóg mikið. Felagsskapurin ynskir grindadráp heilt steðgað.

jan

## Vestfalskyrrindi

13. juni: Fullmánin/Mánin næstur jørðini
19. juni: Seinna kvarter

| Dato | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Vestmannasundi fp. | sp. | Nólsoyarfirði fp. | sp. | Haraldssundi/ Leirvíksfirði fp. | sp. | Skúvoyarfirði/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 15 juni | 0917 | 2144 | 1117 | 2344 | 0732 | 1959 | 0932 | 2159 | 0817 | 2044 | 0832 | 2059 |
| 16 juni | 1012 | 2239 | | 1212 | 0827 | 2054 | 1027 | 2254 | 0912 | 2139 | 0927 | 2154 |